Neistin-VB 21-20 (10-12):

# Silvurið nærri enn nakrantíð




*Tað er serliga í verjuni, at Neistin hevur vunnið sær stig í ár, og dysturin sunnudagin var einki undantak frá hesi regluni*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Alt árið hevur Neistin jagstrað Stjørnuna á øðrum plássi, og við sigrinum á VB tykjast silvurmerkini nú nærri enn nakran tíð hjá Neistanum**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Dysturin um silvurið varð dysturin millum kvinnuliðini hjá Neistanum og VB róptur undan sunnudegnum. Ikki tí at tað varð hesin dysturin, sum avgjørdi silvurið, men tí vinnarin av uppgerðini fór at standa við bestu kortunum á hondini tá tað ræður um at fanga Stjørnuna aftur í endaspurtinum.

Tað gjørdist Neistin, sum vann dystin, og kanska var tað eisini rætti vinnarin av dystinum. Fyrst og fremst tí tær høvdu teir so væl kendu marginalarnar við sær í dystinum.

### Vunnu í verjuni

Fyrstu løtuna var tó ikki líkt til, at Neistanum skuldi tørva hjálp frá nøkrum marginalum.

Alt fyri eitt fingu tær skil upp á verjuna. VB hevði ilt við at spæla seg til nakrar veruligar opnar møguleikar, og tá tær mistu bóltin, vóru tær hjá Neistanum skjótar at revsa.

Spakuliga fekk VB tó frið yvir spælið. Bólttryggleikin gjørdist størri, soleiðis at færri óneyðugir bóltir vórðu tveittir burtur, og so við og við tók munurin at minka. Serstakliga tóktist Regina Radó at vera væl uppløgd. Kanska tí hon fyri tað mesta sat yvir í verjuni, men í øllum var úrslitið mest sum hvørja ferð, at uppspælið gav rúmd fyri einum hoppskoti, sum bar við sær, at bólturin varð kleindur upp í okkurt av málhornunum.

Hesa seinnu løtuna av seinna hálvleiki tóktist yvirvágin hjá VB at vera somikið sannførandi, at ein sigur so smátt fór at hómast, og sum so stóð hetta eisini við í seinna hálvleiki. Var tað ikki fyri sannførandi avrikið hjá Helenu í málinum, so kundi munurin ímillum liðini eisini verið væl størri.

Neistakvinnurnar hava ongan tíð sjálvar skotið tey heilt nógvu málini í ár, og tað gjørdu tær sum so heldur ikki hesaferð. Grundað á framúr málverjaspæl og eina sterka verju, hava tær tó alla tíðina hildi mótstøðuni væl frá teimum nógvu málunum, og soleiðis var eisini hesaferð. Tí hóast VB tóktist hava greiða yvirvág, so megnaðu tær ikki at skræða seg leysar. At VB bert skeyt fýra mál fyrstu 25 minuttirnar av seinna hálvleiki sigur helst eisini nakað um, at so var.

### Vendin

Avgerandi løtan í dystinum kom, tá knappir tíggju minuttir vóru eftir at spæla. VB hevði alla tíðina sæð út sum ein vinnari, men Neistin fekk so ein møguleika, tá VB leikari varð rikin av vøllinum, samstundis sum Neistin fekk brotskast. Brotskastið varð sett í netið, og tá VB í næsta Neistaálopinum fekk enn eina útvísing, lá brádliga væl fyri.

Neistin vann seg trý mál framum, men tær mundu klárað at mist alt tað vunna aftur. Tvær ferðir innan seinasta minuttin skoraði VB, og serliga í seinna førinum komst hetta av óneyðuga nógvum nervum frá neistaleikarunum, men seinasta møguleikan megnaði heimaliðið kortini at halda fast um, og so var vunnið.

### Silvurið

Saman við stigamissinum hjá Stjørnuni ímóti Kyndli hevði sigurin við sær, at Neistin fyri fyrstu ferð í ár er á silvurplássinum, og tað tykist í løtuni sannlíkt, at tær eisini standa við hesum, tá árið er av. Kanska hevur spælið ikki alla tíðina verið so polerað, men í øllum førum hevur tað verið effektivt, og ferð eftir ferð hevur sterka verjan tryggjað liðnum stig.

Skal silvurið gerast veruleiki, krevjast sigrar á teimum trimum botnliðunum og so Stjørnuni, og hetta tykist ikki vera ógjørligt. Serstakliga ikki, tá Neistin tvey ár á rað hevur vunnið seinasta av fýra dystum móti Stjørnuni.

### Dysturin í tølum

**Neisitn-VB 21-20 (10-12)**
Málskjúttar:
Neistin: Katrin á Neystabæ 6, Gunnleyg Berg 6(2), Annika Thomsen 4, Mildrid Jacobsen 3, Susan Brockie 1, Birita Wardum 1
VB: Regina Radó 8(3), Gabriella Fekete 4, Eyðbritt Krosslá 2, Margreth Augustinussen 2, Laila Jespersen 2, Sólrun Krosslá 2
Brotskøst: Neistin 3, VB 3
Útvísingar: Neistin 4, VB 2
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum. Høvdu alla tíðina gott tak á.

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 | VÍF | 5 | 5 - 0 - 0 | 499 | 297 | 202 | 22 |
| 2 | Neistin | 7 | 4 - 1 - 2 | 421 | 371 | 50 | 17 |
| 3 | Stjørnan | 6 | 3 - 1 - 2 | 454 | 375 | 79 | 16 |
| 4 | VB | 6 | 4 - 1 - 1 | 417 | 416 | 1 | 15 |
| 5 | StÍF | 5 | 2 - 0 - 3 | 321 | 402 | -81 | 5 |
| 6 | Kyndil | 7 | 0 - 1 - 6 | 426 | 508 | -82 | 4 |
| 7 | Sóljan | 6 | 1 - 0 - 5 | 330 | 499 | -169 | 4 |

### 1. Deild menn

| | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v - j - t | mál | mál | munur | stig |
| 1 | VÍF | 6 | 6 - 0 - 0 | 532 | 442 | 90 | 23 |
| 2 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 559 | 473 | 86 | 18 |
| 3 | StÍF | 5 | 4 - 0 - 1 | 470 | 454 | 16 | 14 |
| 4 | Kyndil | 7 | 3 - 1 - 3 | 448 | 492 | -44 | 9 |
| 5 | H71 | 6 | 0 - 2 - 4 | 497 | 534 | -37 | 8 |
| 6 | Tjaldur | 6 | 2 - 0 - 4 | 455 | 511 | -56 | 8 |
| 7 | KÍF | 6 | 0 - 1 - 5 | 469 | 524 | -55 | 5 |

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Asta Petrauskiene | Sóljan | 153 | (24) |
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 150 | (44) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 136 | (58) |
| Ioana Rápa | VÍF | 123 | (28) |
| Gabriella Fekete | VB | 109 | (27) |
| Regina Radó | VB | 98 | (24) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 97 | (14) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 93 | (15) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 92 | (37) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 86 | (7) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 81 | (15) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 80 | (1) |
| Birita Wardum | Neistin | 71 | (11) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 70 | (4) |
| Gunnleyg Berg | Neistin | 68 | (9) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heini Joensen | Neistin | 127 | (38) |
| Bjarni Wardum | H71 | 126 | (30) |
| Høgni Klein | Kyndil | 117 | (10) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 115 | (15) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 104 | (29) |
| Finnur Hansson | H71 | 103 | (22) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 102 | |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 101 | (11) |
| Sverri Justinussen | Tjaldur | 97 | (14) |
| Sámal Joensen | VÍF | 96 | (14) |
| Ingi Olsen | VÍF | 94 | (11) |
| Iljan Topic | KÍF | 93 | |
| Durica Tomic | KÍF | 93 | (24) |
| Artur Johansen | StÍF | 88 | (11) |
| Áki Olsen | VÍF | 83 | (11) |



# Broytingar í yngru deildunum

**Tvey av føroysku feløgunum hava latið inn uppskot um broyting í kappingarreglunum fyri yngru deildir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Áðrenn eitt nýtt ár byrjar, er altíð tíð at endurskoða tað farna, og í so máta er fótbóltsárið einki undantak. Hetta hava ymsu feløgini sjálvandi eisini gjørt, og í bæði GÍ og B36 hevur hetta givið úrslit í nøkrum ætlaðum broytingum.

Bæði feløgini hava lagt fram uppskot um broyting í unglingadeildini, og hóast tey ikki eru eins, so kann aðalfundurin væl samtykkja bæði.

Í B36 tykjast tey vera bangin um, at dystartalið hjá unglingaleikarum gerst ov høgt, um øll liðini verða koyrd í ein bólk. Hetta tí nógvir av unglingaleikarunum eisini taka lut í vaksnamannakappingini, og saman við dystunum í unglingakappingini kann talan tá lættliga gerast um einar 40 dystir um árið.

Tí leggur B36 fram uppskot um, at kappingin í unglindeildini verður skipað í tveir bólkar.

### Broyta aldursreglurnar

Í GÍ er tað ikki heilt tann sami trupulleikin, sum hugsað verður um. Ásannandi av, at í fleiri av smærru feløgunum er neyðugt at taka leikarar upp av dreingjaliðnum til unglingadeildina, vilja gøtumenn broyta reglugerðina soleiðis, at eisini eldri leikarar kunnu vera við.

Sambært uppskotinum skal hvørt felag hava møguleika at nýta upp til tríggjar eykaleikarar frá besta liðnum, sum eru oman fyri unglingaaldur, men sum ikki komu inn á vøllin fyri besta liðið. Hetta skal tryggja eykaleikarum á bestu liðunum meira spælitíð, samstundis sum hesir kunnu menna leikararnar í unglingadeildini, og feløgini sleppa harafturat undan at taka leikarar upp av dreingjaliðunum.

Hendan skipanin er annars eisini nýtt í Onglandi, tó at talan har er um tveir vaksnar leikarar, sum kunnu spæla við unglingaliðnum, og verður hetta ofta nýtt til eykaleikarar ella til leikarar, sum eru í ferð við at koma seg eftir ein skaða.

Eisini hevur GÍ lagt fram uppskot um, at í yngru deildunum skal tað vera skúlaflokkurin og ikki føðingarárið, sum ger av, í hvørjari deild leikarar skulu leika. Hetta fyri at betra um sosiala partin av yngru kappingunum, har tað annars kann koma fyri, at leikari noyðist at spæla í aldursbólki, sum antin er oman- ella niðanfyri bólkin, har allir floksfelagarnir spæla.

# Tryggingar á skránna

Ásannandi at føroyskir fótbóltsleikarar í nógvar mátar eru at meta sum yrkisleikarar, hava ikki færri enn 10 feløg lagt uppskot til aðalfundin, har heitt verður á FSF um skipa soleiðis fyri, at allir føroyskir fótbóltsleikarar eru tryggjaðir.

Sum er, hevur FSF bert ábyrgdina av, at landsliðsleikarar eru tryggjaðir, men hetta meta tey 10 feløgini ikki vera nøktandi.

Umframt at tryggja leikararnar sjálvar ímóti inntøkumissi, so vilja feløgini við uppskotinum eisini tryggja sær, at feløgini ikki verða við skerdan lut, um ein av berandi leikarunum á liðnum verður langtíðarskaddur.

Víst verður í hesum sambandi á, at grunda á fíggjarligu bindingarnar, sum feløgini eisini hava mótvegis skaddum leikarum, kann verða sera tungt at útvega sær neyðugan styrk, um leikarar verða langtíðarskaddir, og við teimum upphæddum, sum europeiskur fótbóltur hevur við sær, kann hetta innibera ein fíggjarligan smeit fyri feløgini.

Tey tíggju feløgini, sum hava skrivað undir uppskotið, eru HB, B36, EB/Streymur, B68, GÍ, NSÍ, KÍ, VB, Skála og TB

**-jm**

# Hondbóltsframsýning á Hálsi



*Kvinnuliðið hjá VÍF verður ein av pørtunum, sum hósdagin fer at taka lut í vælgerandi tiltakinum, sum Neistin skipar fyri*

**Neistin fer hósdagin at skipa fyri framsýningardysti, har allur innkomni peningurin fer óskerdur til vælgerandi endamál**

HONDBÓLTSFRAMSÝNING
*Jákup Mørk*

Tað er vanligt í nógvum av londunum kring okkum, men her í Føroyum hevur tað eina mest verið gjørt á stevnum, at sonevndir framsýningar- ella uppvísingardystir verða leiktir.

Hósdagin verður tó skipað fyri einum slíkum dysti, og er tað hondbóltsfelagið, Neistin, sum hevur tikið stig til tiltakið.

Talan verður um dystir, har tvey samansett lið skulu royna seg móti besta mans- og kvinnuliðnum í landinum, og hevur hetta í báðum førum verið VÍF tey bæði seinastu árini.

VÍF hevur játtað at tikið lut í hesum, og síðani hevur Neistin heitt á umboð fyri Dimmalættin og Sosialin at seta tvey hóskandi mótstøðulið saman til tiltakið.

Sum nevnt, so fer allur tann innkomni peningurin frá tiltakinum óskerdur til vælgerandi endamál, og umframt innkomna peningin av sjálvum dystinum, er eisini møguleiki at stuðla tiltakinum við at seta pening á konto í peningastovni. Konto-nummarið til hetta er 9181-134.457.7.

### Liðini til dystirnar eru:

Kvinnur:
Agne Masenaite, Stjørnan
Helena Dam Poulsen, Neistin
Gunnleyg Berg, Neistin
Guðrun Ólavsdóttir, StÍF
Anna Kristina Samson, Stjørnan
Anna Maria Bertelsen, StÍF
Annika Thomsen, Neistin
Katrin á Neystabø, Neistin
Annika Ljósstein, Kyndil
Lotte Sørensen, Kyndil
Asta Petrauskien, Sóljan
Joan M. Joensen, Stjørnan

Menn:
Marian Cirloganescu, StÍF
Óla Christian Djurhuus, KÍF
Mortan Hansen, Tjaldur
Janus Einar Sørensen, Kyndil
André F. Danielsen, StÍF
Hans Áki Dal-Christiansen, Neistin
Kristjan Petursson, H71
Jacob Jónsson, Neistin
Heini Joensen, Neistin
Costin Dumitrescu, StÍF
Høgni Klein, Kyndil
Bjarni Wardum, H71

Venjarar hjá báðum liðunum verða Geir Wardum úr Stjørnuni og Dia Midjord úr Neistanum.

# Skráin til aðalfundin

Sum tað framgongur aðra staðni í blaðnum, so eru fleiri mál, sum aðalfundurin hjá FSF skal taka støðu til leygrdagin.

Fótbóltssambandið hevur nú sent feløgunum skránna til aðalfundin, og er hon hendan.

1 Formaðurin greiddir frá virki F.S.F.'s í farna ári
2 Kassameistarin/formaðurin leggur fram grannskoðaðan roknskap
3 Innkomin mál
   a) frá FSF: Uppskot um broyting í kappingarreglunum fyri fótbólt
   b) frá FSF: Uppskot til samtyktar viðv. húsinum við Tórsvøll
   c) frá GÍ: Uppskot til samtyktar viðvíkjandi unglingadeildini
   d): frá B36: Uppskot til samtyktar viðvíkjandi unglingadeildini
   e): frá HB, B36, EB/Str, B68, GÍ, NSÍ, KÍ, VB, Skála, TB: Uppskot til samtyktar viðv. trygging av leikarum, sum spæla í fyrstu deild menn.
4 Velja nevndir og varalimir
5 Velja grannskoðara, ið skal vera ríkisgóðkendur
6 Ymiskt

Hvørt felag kann í mesta lagi senda trý umboð á fundin. Hvørt felag hevur atkvøðurætt við einari atkvøðu, eins og nevndin hjá FSF hevur eina atkvøðu. Fyri at hava atkvøðurætt skal felag hava luttikið í fótbóltskappingini við minst einum liði í undan farna ári, og fíggjarligu viðurskiftini hjá felagnum mótvegis FSF skulu vera í lagi

**-jm**